
LANDSLÆKNIN
CHIEF MEDICAL OFFICER
SIGMUNDARGØTA 5 - POSTSMOGA 9
FR-110 TÓRSHAVN - FAROE ISLANDS
Tlf. +298-11832 - Fax +298-17660

AVRIT

Dagfesting 21. juli 1997

J. nr. 011-0034-97
(at skila til í svari) HDJ/js

Føroya Landsstýri
Postsmoga 64
100 Tórshavn

Viðvíkjandi lóg fyri Føroyar um sterilisatión, landsstýrisins j. nr. 607-1.

Landsstýrið hevur við brævi dagfest 30. juni 1997 biðið um

*Landslæknin sendi í 1997 landsstýrinum sítt viðmæli av, at persónar yvir 25 ár kunnu steriliserast, tá ið tey sjálvi biðja um tað*

# Landslæknin mælt til broyting í 14 ár

**LÓGARBROYTINGAR** Síðani 1997 hava Landslæknin og formaðurin í Sterilisatiónsnevndini mælt landsstýrinum til at dagføra gomlu lógina um sterilisatión. Men enn er einki hent.

Eyðun Klakstein

Øll, sum skulu steriliserast í Føroyum, skulu søkja Sterilisatiónsnevndina um loyvi. Umsókn við persónligum upplýsingum og viðmæli frá lækna skal sendast nevndini, sum síðani skal játta í hvørjum einstøkum føri.

Seinastu 12 árini hava millum 48 og 92 fólk á hvørjum ári søkt serligu nevndina um loyvi at sterlisisera seg.

Nevndin hittist umleið annan hvønn mánað, og tá verða allar tær innkomnu umsóknirnar viðgjørdar. Nevndin tekur støðu á fundinum, og síðani fáa umsøkjari og lækin hjá honum boð um avgerðina. So at siga allar umsóknirnar verða játtaðar. Eitt jattandi svar frá nevndini er galdandi í eitt hálvt ár. Verður sterilisatiónin ikki gjørd innan tað, skal umsøkjarin søkja av nýggjum.


*– Eg havi síðani 1997 regluliga mælt til, at lógin um sterilisatión verður dagførd, sigur Høgni Debes Joensen, landslækni.*

Í Sterilisatiónsnevndini halda tey, at tað er óneyðugt, at ein nevnd skal siga gott fyri hvørji einastu sterilisatión í landinum.

– Eg havi síðani 1997 regluliga mælt til, at lógin um sterilisatión verður dagførd, tí tíðin er farin frá henni, men enn er tað ikki hent, sigur Høgni Debes Joensen, landslækni.

## Aldursmark og fríari

Lógin um sterilisatión, sum føroyingar mugu fylgja, er frá 1967.Í okkara grannalondum eru lógirnar dagførdar síðani, og ein avgerandi munur á Føroyum og grannalondunum er, at fólk, sum eru yvir ein vissan aldur – í fleiri londum 25 ár – kunnu sjálvi gera av, um tey vilja steriliserast. Ein nevnd viðger umsóknir frá yngri fólki.

Landslæknin og formaðurin fyri Sterilisatiónsnevndina, Henrik Møller, dómari, hava mælt til, at hetta eisini verður innført í Føroyum, men hóast landsumsitingin regluliga hevur fingið skriv og áheitanir um hetta síðani 1997 – seinast beint fyri jól í fjør - er lógin ikki broytt.

Og tí skulu øll, sum ætla sær at steriliserast í Føroyum, sendi umsókn til væl kvalifiseraðu Sterilisatiónsnevndina.

eydun@sosialurin.fo

